# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Donsku hermenninir eru tvífaldir fíggindar. Teir hava gjørt innrás her og vanærað Muhammed profet*
*Taleban-talsmaður*

# Republikanarin Colin Powell styðjar demokratin Barrack Obama

**Hóast hann hevur gjørt tænastu undir trimum republikonskum forsetum hevur Colin Powell valt at styðja demokratin Barrack Obama til forsetavalið**



*Colin Powell: - Eg vænti, at Barrack Obama verður ein góður forseti*
*Mynd: NBC*

Fyrrverandi amerikanski generalurin, verjuovastin og uttanríkisráðharrin Colin Powell vil hava Barrack Obama til forseta. Tað avdúkaði hann í einari samrøðu við sjónvarpið NBC um vikuskiftið.

- Eg haldi, at Barrack Obama verður ein forseti, sum fer at broyta viðurskiftini, og tí atkvøði eg fyri honum, segði Colin Powell.

Amerikonsku fjølmiðlarnir hava leingi spurt, hvørt Colin Powell mundi styðja republikanska forsetavalevnið John McCain ella demokratin Barrack Obama. Í sjónvarpssendingini var Powell varin við at finnast at McCain, men hann duldi ikki fyri, at hann helt McCain hava gjørt eitt mistak, tá hann valdi Sarah Palin til sítt varaforsetavalevni.

- Eg var vónbrotin av avgerð hansara. Eftir mínum tykki er Sarah Palin ikki búgvin til at átaka sær forsetaembætið, og tað má ein varafroseti vera, segði Powell.

Colin Powell, sum nú er 71 ára gamal, var trygdarráðgevi hjá Ronald Reagan, forseta, hann gjørdist verjuovasti undir George Bush í 1989 og var uttanríkisráðharri hjá George W. Bush frá 2001 til 2005.

# Taleban hóttir Danmark

**Taleban hevur ikki gloymt tekningarnar av Muhammed profeti og roynir at hevna tær**

-Vit gera okkara besta fyri at raka teir donsku hermenninar so hart sum til ber. Vit vilja drepa teir og noyða teir út úr landi okkara. Fyrr ella seinni taka vit teir, og so fáa vit hevnd.

Soleiðis sigur høvuðstalsmaðurin hjá Taleban, Qari Yousuf Ahmadi, í samrøðu við Ekstrablaðið í dag. Hann sigur, at fyri Taleban er tað serliga umráðandi at raka teir donsku hermenninar í Afghanistan, tí at Jyllands-Posturin og onnur donsk bløðprentaðu tekningarnar av Muhammed profeti.

- Teir fremmandu hermenninir eru okkara fíggindar, men teir donsku erui tvífaldir fíggindar. Í fyrra lagi eru teir fíggindar okkara, tí teir hava gjørt innrás í land okkara, og í øðrum lagi tí teir hava vanærað okkara heilaga pårofet og Koranina, sigur Qari Yousuf Ahmadi við Ekstrablaðið.

Taleban-rørslan er framvegis sterk nógvastaðni í Afghanistan og hevur serliga gjørt um seg í Helmand-landspartinum, har millum annað danskir hermenn halda til. Qari Yousuf Ahmadi sigur, at Taleban fer ikki at tapa bardagan.

- Vit standa sterkir í øllum landinum, serliga í Helmand, og okkara stríðsvilji er góður, sigur hann.

# Ukraina skal hava tjóðarstjórn

**Ukrainsku politikararnir mugu leggja allar ósemjur til viks og ganga saman um at skipa eina tjóðarstjórn**



*Julia Timoshenko vil hava politiska semju í Ukraina*
*Mynd: Reuters*

Eins og fleiri onnur lond er Ukraina komið í trupulleikar av teirri heimsumfatandi fíggjarkreppuni, og sambært forsætisráðharranum, Julia Timoshenko, er støðan so álvarssom, at landsins politikararnir eiga at semjast um at loysa trupulleikarnar í felag.

Julia Timoshenko segði um vikuskiftið, at teir politisku flokkarnir í samgongu og andstøðu eru noyddir til at leggja alt politiskt kegl til viks og at taka hendur saman um at loysa landsins trupulleikar.

Julia Timoshenko hevur leingi ligið í opnum stríði við Viktor Justjtjenko, forseta. Endin varð, at hann sendi tjóðartingið til hús og boðaði frá nývali. Tað verður tann 7. desember, sjálvt um forsætisráðharrin er ímóti tí.

Ukraina hevur søkt Altjóða Gjaldoyragrunnin IMF um 14 milliardir dollarar í láni, sum stjórnin ætlar at brúka til at hjálpa bankakervinum.

## STUTT SAGT

### Kinesarar rændir í Sudan

Ókendir menn hava rænt og burturflutt níggju kinesarar, sum arbeiddu í oljuídnaðinum í útsynningspartinum av Sudan. Tilburðurin er fyribils tann seinasti í einari røð av atgerðum ímóti kinesiskum áhugamálum í Sudan, skriva tíðindastovurnar.

Sudansku myndugleikarnir siga, at tað eru uppreistrarmenn í Darfur-landspartinum, sum hava burturflutt kinesararnar, men eingin avteimum felagsskapunum, sum stríðast við stjórnina, hevur enn átikið sær ábyrgdina.

Hinvegin er tað ein sannroynd, at uppreistrarfelagsskapirnir hava funnist at kinesiska virkseminum í sudanska oljuídnaðinum, tí á tann hátt styðjar Kina stjórnarherin í bardaganum um Darfur.

Altjóða mannarættindafelagsskapir hava eisini funnist at Kina og sagt, at landsins samstarv við sudansku stjórnina forðar fyri einari loysn í Darfur, har umleið 300.000 fólk hava latið lív í bardøgum og ágangi. Meiri enn 2,5 milliónir fólk eru flýdd heiman.

Kina keypir tveir triðingar av teirri olju, sum kemur upp úr jørðini í Sudan, og 70 prosent av sudanska útflutningsvirðinum stavar frá oljuni. Kina hevur sýtingarrætt í ST-trygdarráðnum og hevur verið ímóti øllum uppskotum, sum hava mælt til at revsa Sudan fyri at fáa eina loysn á Darfur-kreppuni.

### Jarðskjálvti á Tonga

Ein rættiliga harður jarðskjálvti skakaði gjáranáttina oynna Tonga har suðuri ím Kyrrahavinum.

Skjálvtin var 7,1 á Richterstiganum, og tíðindastovurnar skriva, at hann vardi næstan tveir minuttir. Sagt verður, at húsini í høvuðsstaðnum Nukualufa skulvu, og at fleiri rútar brotnaðu av ristingunum. Einki er tó frætt um mansskaða.

Jarðfrøðingarnir siga, at miðdepilin í jarðskjálvtanum var 33 kilometrar undir havbotninum einar 120 fjórðingar frá eysturstrondini á Tonga. Hóast hann var oman fyri sjey á Richterstiganum, varð ikki ávarð um møguliga flóðaldu.